# U M S Ó K N

# M I N N I N G A R G R U N N U R
# D Á N J A L   N I C L A S E N

**1. Persónligir upplýsingar**

Navn ____________________

Føðingardagur/føðingarstaður ____________________

**Uttanlands**

Gøta ____________________

Postnr. og býur ____________________

Land ____________________

Tel. nr. ____________________

**Føroyar**

Gøta ____________________

Postnr. og býur ____________________

Tel. nr. ____________________

**2. Lokin prógv**

| Útbúgvingarstað og prógv | Ár |
|---|---|
| | |
| | |

**3. Verandi lestrargrein**

Heiti á lestri og sergrein ____________________

____________________

**4. Lestrarstað**

Navn ______________________________

Gøta ______________________________

Postnr. og býur ______________________________

**5. Lestrarbyrjan og endaligt prógv**

Nær er / verður byrjað ______________________________

Endalig próvtøka ______________________________

**6. Inntøkur**

| | DKK |
|---|---|
| | |
| | |
| | |
| | |

Dagfesting ________________ Undirskrift ____________________________________

---

Endamálið við Minningargrunni Dánjal Niclasen er at stuðla ungum føroyingum, ið vilja fáa sær víðari útbúgving innanfyri føroyska fiskivinnu, eitt nú hvat viðvíkur:

1. Kanning av fiskiskapi uttanfyri Føroyar, sum kann bera í sær nýggjar veiðuhættir ella veiðu av fiskasløgum, ið ikki hava verið vanlig í Føroyum.
2. Víðari útbúgving, ið hevur við viðgerð og góðsking av fiski og fiskavørum at gera.
3. Marknaðarkanningar til frama fyri føroyska fiskivinnu.
4. Serútbúgving í handils- og fíggjarviðurskiftum, sum hava við fiskivinnu at gera.

**Vegleiðing til**

# U M S Ó K N

# M I N N I N G A R G R U N N U R
# D Á N J A L   N I C L A S E N

Minningargrunnur Dánjal Niclasen varð settur á stovn í august 1976 til minnis um Dánjal Niclasen, fyrrverandi stjóra á Fiskasøluni. Dánjal Niclasen teknaði Føroya Fiskasølu í mong ár. Hann var formaður í umboðsnevndini frá byrjanini og var stjóri á Fiskasøluni frá 1958 til 1969. Dánjal Niclasen var altíð hugaður fyri, at ungdómurin skuldi fáa holla útbúgving, og tá hann doyði avgjørdi einkjan, Karen Niclasen, at stovna ein grunn, sum kundi nýtast til at fíggja víðari útbúgving innanfyri føroyska fiskivinnu.

---

**0. Alment**

Allir umsøkjarar skulu saman við umsóknarblaðnum gera eina frágreiðing, har umsøkjari setur fram sannførandi grundgevingar fyri játtan av stuðli og frágreiðing um, hvat ætlanin er at nýta stuðulin til. Frágreiðingin skal fylla ½ til 1/1 A4 síðu.

**1. Persónligir upplýsingar**

Í hesum teigi skal umsøkjari upplýsa fullfíggjaða adressu og telefonnr. bæði uttanlands og í Føroyum. Viðleggjast skal avrit av dóps- ella navnabrævi.

**2. Lokin prógv**

Í hesum teigi verður upplýst hvørji prógv umsøkjari hevur lokið aftaná fólkaskúlan, áðrenn farið varð undir verandi lestur. Lokin prógv skulu viðleggjast umsókníni sum avrit.

**3. Verandi lestrargrein**

Heiti á lestrargrein og møguligari sergrein verður upplýst í hesum teigi.

**4. Lestrarstað**

Upplýst verður í hesum teigi navn og adressa á tí útbúgvingarstovni, har lestur fer fram. Tað er umráðandi, at umsøkjari viðleggur eina dagførda váttan frá útbúgvingarstovninum, at umsøkjari er innskrivaður á viðkomandi útbúgvingarstovni.

**5. Lestrarbyrjan og endaligt prógv**

Í hesum teigi skal umsøkjari upplýsa, nær lesturin er byrjaður og nær lesturin væntast at verða liðugur. Viðleggjast skal ein váttan frá útbúgvingarstovninum, nær lesturin er byrjaður, og hvussu long útbúgvingin vanliga er.

**6. Inntøkur**

Í hesum teigi skal upplýsast, um umsøkjari hevur inntøku ella fær annan stuðul.

---

Um umsóknin verður játtað, skal peningurin flytast til:

| | |
|---|---|
| Navn | ____________________ |
| Gøta | ____________________ |
| Postnr. og býur | ____________________ |
| Land | ____________________ |
| Tel. nr. | ____________________ |
| Peningastovnur | ____________________ |
| Gøta | ____________________ |
| Postnr. og býur | ____________________ |
| Land | ____________________ |
| Kto. nr. | ____________________ |